*Tey stóru fakfeløgini eru í øðini inn á løgtingsmann:*

# Krígsavbjóðing frá Jákup Sverra Kass

*– Løgtingið hevur onki at gera við læraraverkfallið og bæði Jákup Sverri Kass og allir aðrir løgtingsmenn skulu halda seg langt burtur, siga fakfeløgini*




*Verkfallið hjá lærarunum harðnar í hvørjum og í gjár stóðu lærarar eisini við fíggjarmálastýrið og vísti sína ónøgd. Men hóast tað nú hevur vart í fimm vikur, skulu bæði Jákup Sverri Kass og aðrir løgtingsmenn, halda seg langt burtur, siga tey stóru fakfeløgini*

Áki Bertholdsen

Tá ið Jákup Sverri Kass, løgtingsmaður, fortaldi í Sosialinum í gjár, at hann nú ætlar at fáa Løgtingið at samtykkja eina lóg, sum ger enda á verkfallinum hjá teimum sáttmálasettu lærarunum, var tað sum at festa í fjús.

Tí við hesi ætlanini hevur hann gjørt seg til seg sera illa lýddan, bæði hjá lærarum og ikki minst hjá fakfeløgunum.

Jákup Sverri Kass segði við Sosialin í gjár, at hann helt, at lærarverkfallið nú hevði vart ov leingi og fyri at verja børnini og foreldrini, ætlaði hann hesa vikuna at royna at savna undirskriftir frá 16 øðrum tinglimum, so at uppskot kundi leggjast fyri tingið sum endaði verkfallið við lóg.

Fyri at leggja uppskot fyri tingið nú, krevjast nevniliga undirskriftir frá 17 tinglimum

**Ein krígsavbjóðing**

Men hendan ætlanin hevur rættiliga loypt øði í, bæði hjá lærarum í verkfalli, hjá Lærarafelagnum sjálvum og hjá øðrum fakfeløgum við.

Heini Joensen, næstformaður í Starvsmannafelagnum kallar hetta rætt og slætt eina krígsavbjóðing.

Starvsmannafelagið hevur samstundis sent løgtinginum mótmæli, har ætlanin at leggja seg uppí ósemjuna verður harðliga átalað.

–Hetta er at leggja seg út í viðurskifti, sum Løgtingið onki hevur við at gera, sigur Heini Joensen.

Hann sigur, at hetta er grovur ágangur ímóti rættinum hjá fakfeløgunum at samráðast um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

Næstformaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at skuldi tingið gjørt nakað, so skuldi tað einasta verið, at tað álegði fíggjarmálastýrinum at farið undir veruligar samráðingar, so at ein semja kundi fingist í lag.

– Løgtingið hevur heimild til at áleggja fíggjarmálastýrinum at fara undir veruligar samráðingar og føldi tingið, at trupulleikar vóru, átti tingið at brúkt tað heimildina, ístaðin fyri at brúka sítt løggevandi vald til at taka tann grundleggjandi rættin, sum verkfalsrætturin er, frá fakfeløguum

Eftir hansara tykki er tað júst trekleikin hjá fíggjarmálastýrinum tann stóri trupulleikin í samráðingunum.

– Ístaðin fyri at hetta æviga stríðið ímóti fakfeløguum, áttu bæði Løgtingið og fíggjarmálastýrið heldur at lagt á annan bógv og roynt at skapt frið á arbeiðsmarknaðinum.

– Tað skuldi fíggjarmálastýrið gjørt við at ført eitt veruligt og støðugt samskifti við feløgini, so at vit sluppu undan støðum sum hesari, ið vit hava havt alt ov nøgvar av tey seinastu árini

Hann sigur, at fíggjarligu árinini av teimum ósemjum, sum hava verið, eru stór, men tey eru kanska ikki tey ringastu.

– Tað ringastu er at lekja tey høggini, sum álitið ímillum partarnar fær í lemjandi ósemjum sum hesum, sigur hann.

– Tað, at vit javnan og savnan hava ósemur á arbeiðsmarknaðinum er kanska tann álvarsamasta avleiðingin av tí linju, sum fíggjarmálastýrið hevur lagt.

–Men fer Løgtingið nú at leggja seg uppí, fer tað heilt avgjørt ikki at bøta um útlitini fyri at luftin ímillum feløgini og politiska myndugleikan skal batnað.

–Tí hetta er ein ósiður, sum ongastaðni hoyrir heima, sigur Heini Joensen.

–Rætturin at fara í verkfall er tað einasta, fakfeløgini eiga og tann rættin skal Løgtingið ikki taka frá okkum, leggur hann afturat.

**Niðurbrýtur alt álit**

Eisini formaðurin í einum øðrum, stórum fakfelag. Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag átalar harðliga ætlanina hjá okkara yngsta løgtingsmanni at fáa tingið at gera enda á verkfallinum.

Tingið skuldi heldur tvingað Karsten til aftur samráðingrborðið og Jákup Sverri Kass skuldi heldur savna 16 tingmenn saman við sær at lagt uppskot fyri tingið um at játta tann neyðuga peningin, sum lógin kostar, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at álitið hjá feløgunum á politikararnar er lítið, sum er, men leggur tingið seg uppí samráðingarnar, er tað seinasta farið.

Og hetta er í beinleiðis andsøgn til tað, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður fleiri ferðir hevur ført fram í seinastuni um, at tað, sum umræður nú, er at endurbyggja álitið ímillum fakfeløgini og landsins myndugleikar, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag.

# Karsten Hansen: Soleiðis kann mann ikki arbeiða

*–Tað ber ikki til, at einstaklingar í samgonguni fara í sjálvdrátt, soleiðis sum Jákup Sverri Kass ger í einum so stórum, týdningar miklum máli, sum hesum*

Áki Bertholdsen

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum hevur ikki tikið tað væl upp, at Jákup Sverri Kass nú ætlar sær at taka stig til at fáa løgtingið upp í málið.

Karsten Hansen, sum hevur ábyrgdina av samráðingarnar av samráðingunum fyri landið, er framvegis av teirri áskoðan, at løgtingið skal ikki leggja seg uppí samráðingarnar.

Men at tað skal vera ein tingmaður í sjálvari samgonguni, sum ætlar at taka stig til at fáa løgtingið uppí, hevur hann tikið serliga illani upp.

Hann sigur, at tað ber heilt einfalt ikki til, at einstaklingar í samgonguni fara í sjálvdrátt og taka stig til at leggja eitt so stórt og týdningarmikið mál fyri tingið, uttanum samgonguna, sigur Karsten Hansen.

– Eg rokni ikki við, at hann fær nógvar tinglimir úr samgonguni at skriva undir eitt uppskot um at leggja fyri tingið. Tvs, at hann skal hava flestu undirskrivtirnar úr andstøðuni, kanska saman við onkrum einstaklingum úr samgonguni.

Hvørjar avleiðingar hetta hevði fingið, vil hann ikki útgreina.

Tað einasta, hann vil siga er:

– Soleiðis kunnu vit ikki arbeiða í eini samgongu, og eg rokni við, at tá ið tað kom tilstykkis, hevði Jákup Sverri Kass hugsað seg tvær ferðir um, áðrenn hann tók eitt slíkt stig, sigur landsstýrismaðurin.

Karsten Hansen sigur, at hann hevur greitt Jákup Sverra Kass frá álvaranum í málinum.

Men Jákup Sverri Kass sigur, at hann hevur fleiri ferðir boðað Karsten Hansen frá, at hetta bleiv endin, um ikki okkur hendir

Tó sigur hann, at hann ger onki, nú útlit vóru til at samráðingarnar fara at vera tiknar uppaftur.

Hevði hendan fráboðanin ta ávirkan, at hon hjálpti til at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið, er ikki so lítið vunnið, helt hann.

Annars hevur hann sjálvur merkt, at fráboðanin frá honum í Sosialinum í gjár, hevur vakt ans. Hann hevur fingið ein hóp av teldubrøvum, bæði frá lærarum, sum vóru ímóti ætlanini og frá foreldrum, sum vóru fyri og hann brúkti fleiri tímar í gjár um at svara aftur.

# Natúra og heilsa er ein lívsstílur

Í nógv ár hevur Irena Jacobsen í Hvalba havt fibromyalgi sjúkuna, sum voldi henni nógvan trega hvønn einasta dag. Men eina ferð hon var í Danmark og ferðaðist, datt hon niður á eina lýsing, har ein kona helt fyrilestur um aloe vera og fibromyalgi.

Aloe vera er ein planta, sum læknar høvdu funnið útav, hevði fleiri góðar eginleikar.

Hon var og lurtaði eftir hesi konuni og gjørdi av at royna hetta evni og tað gingu ikki nógvir dagar, til hon livdi nógv betri.

Tær góðu royndirnar fekk hana til at blíva føroyskt umboð fyri fyritøkuna, sum ger hesar vørurnar. Talan er um heimsins størsta framleiðara av aloe vera úrdráttum. Nú ger hendan fyritøkan yvir 50 ymsar vørur, bæði smyrsl, krem og ymiskt at eta og drekka, tað er alt er 100 vistfrøðiligt.

Fyritøkan selur fyri fleiri milliardir um árið og hevur umboð í yvir 60 londum. Nú er umboð fyri deildina hjá hesi fyritøkuni í Danmark komin til Føroyar at kunna um vøruna. Endamálið er eisini at fáa fleiri umboð í Føroyum og øll eru vælkomin til teir báðar kunnandi fundirnar, sum verða.

Fundur verður í MBF húsinum fríggjadagin klokkan 19.00 og í Ólavstovu í Saltangará leygardagin klokkan 15. Sí annars lýsing aðrastaðni í Sosialinum í dag.

*–Áki–*